# Lemma gjørdist svíkjari fyri verðsligari virðing

**I eini skipan sum teirri kommunistisku verður ein ofta svikin av teimum, ein hevur álit á. Hetta høvdu vit nógv dømi um. Eitt av teimum var Lemma**

Lemma kom á sjúkrahúsið í Yirgalem sum sjúklingur í 60-unum. Hann fekk viðgerð og gjørdist frískur.

Hann hevði nakað av skúlagongd. Tískil fekk hann skrivstovuarbeiði á sjúkrahúsinum. Hann kom longur og longur upp í tign og gjørdist starvsfólkaleiðari.

Hann hevði tey evni, at hann dugdi væl at smikra. Hann rósti øllum og helt við øllum uttan mun til teirra sjónarmið.

Tá ið kommunistarnir komu til ræði í Etopia, vónaði hann at gerast limur í kommunistaflokkinum. Hetta kundi vera eitt springbretti at koma enn longur fram í samfelagnum.

Tað var ein serligur heiður at gerast limur í flokkinum. Sjónliga merki fyri hesum var ein serligur "heiðursuniformur", sum gav eina rættiliga tign í samfelagnum. Tað vóru á sjúkrahúsinum nøkur, sum høvdu slíkar uniformar. Lemma sá fram til dagin, tá ið hann kundi ganga runt í hesum klæðum.

Tað bar tó ikki til at líma seg inn í ein kommunistiskan flokk. Ein skuldi gera seg verdugan at verða boðin uppí flokkin. Í minsta lagi skuldi vísast rætt kollveltingarligt sinnalag!

Starvið hjá Lemma á sjúkrahúsinum gav honum eisini møguleikan at gera seg verdugan til slíkan limaskap.

Øll kristin vóru mett at vera antikollveltingarlig. Tí dámdi heldur ikki floksleiðsluni, at tað var so nógv kristiligt virksemi á sjúkrahúsinum, sum jú staturin átti, men missiónin rak.

Við ymiskum slagi av ágangi var tað eydnast at avmarka hetta virksemi, men kortini var hildið fram við kvøldmøtum og morgunandaktum, sjálvt um fá komu.

## Lemma gjørdi seg verdugan til limaskap í flokkinum

Hetta var møguleikin hjá Lemma. Hann fór á floksskrivstovuna og greiddi frá hesum andaktum. Hann hevði eisini við sær ein lista yvir tey, sum luttóku á hesum samkomum.

Hetta kom væl við hjá floksleiðsluni. Stutt eftir fingu starvsfólkini á sjúkrahúsinum boð um at møta upp á floksskrivstovuni. Floksleiðarin átalaði hetta virksemi. Hann duldi ikki fyri, at hann visti eisini um fleiri teirra, sum luttóku.

Men nú skuldi tað vera endi á hesum. Tey fingu løn fyri at hjálpa teimum sjúku og ikki fyri trúboðaravirksemi! Hildu tey fram við hesum, fór tað at fáa avleiðingar! Eingin tordi at koma aftur til hesar andaktir.

Hetta var tað, sum skuldi til fyri at gera Lemma verdugan til limaskap í flokkinum, og hann fekk sín heiðursuniform!

Roynt var seinni at fáa hesi kravboðini broytt aftur. Norski læknin á sjúkrahúsinum Sigmund Lende gjørdi av at fara at tosa við hægri floksleiðsluna í økinum. Tilvildarliga skuldi Lemma eisini ørindi til somu leiðslu og helt, at teir skuldu fylgjast. Hetta var annars als ikki tilætlað, men vísti seg kortini at vera til gagns.

Lende framførdi síni ørindi, og tá gjørdist Lemma lotur, tí henda støðan var júst honum fyri at takka.

Men júst hesin floksleiðarin var sera rímiligur. Hann helt, at sjálvsagt kundu tey halda andaktir, um hetta ikki var í arbeiðstíð, og teir annars ikki blandaðu seg uppí politikk. Sloppið var.

## So falskur var Lemma

Aftur vísti Lemma, hvussu falskur hann var. Tá ið teir báðir vóru komnir útum sigur hann: "Nú gjørdist eg glaður". Lemma var sær sjálvum líkur og visti nokk ikki, at Sigmund kendi alt til hansara dupultspæl.



*Fleiri av systkjunum hjá Elsu hava verið á vitjan í Etiopia. Í 1999 var Jónhild á vitjan saman við Elsu. Her sæst hon **t.v.** á eini matstovu á leiðini til Addis Abeba. Næst Jónhild sita Jóhannes Olafsson og seinna kona hansara Kari, sum er norsk. **Uttast t.h.** situr Felix Oafsson. Hann var fyrsti trúboðarin, sum byrjaði virksemi í Konso árini 1953-58. Hann var eisini á vijan í Etiopia um somu tíð. Felix og Johannes eru íslendingar.*
***Rætting:** Trúboðaramyndin í seinasta parti var ikki frá 60'num men 70'unum*

Sigmund fekk so høvi til at áleggja Lemma at skriva eina plakat um, at nú kundu hesi møtir vera aftur. Ja, tað skuldi hann gera. Hann hevði sjálvur hoyrt boðini frá flokkinum! Tað var eisini fult av fólki til komandi andaktirnar.

Hjá Lemma kundi bert ganga niður á bakka. Tá kommunisman fall, fór hann eisini niður í tign. Hansara heiðursuniformur varð ikki nógv verdur eftir hetta. Hetta kom hann eisini at merkja frá sínum arbeiðsfeløgum. Hann fekk eisini truppulleikar við tí váta slagnum.

Seinni byrjaði hann kortini at koma aftur til morgunandaktirnar. Hann gjørdist sjúkur og doyði stutt eftir.

Lemma var ein vælmeinandi medarbeiðari, men hann var ein, sum eisini valdi løtuvinning fram um tað meira varandi.

# Ómøguligur hotellstjóri settur fastur

**Tað kann nógv ringt sigast um eitt einaræði sum tað etiopiska. Men her er ein stuttlig søga um, at tað kann eisini nytta fáast burtur úr eini slíkari skipan. Hesa frásøgn hevur Sigmund Lende í bók síni Dobbel Ild**

Yirgalem hospitalið liggur 2-3 tríggjar kilometrar uttan fyri býin. Tað liggur júst har, tí har er nóg mikið av vatni. Vatnið verður pumpað upp í ein stóran tanga, og haðani verður tað leitt til tær ymisku deildirnar á sjúkrahúsinum.

Beint við er eisini eitt hotell, sum fær vatn frá somu keldu.

Hospitalið hevði brúk fyri meira av vatni og hevði tí eisini brúk fyri størri pumpumegi, og til hetta skuldi serlig útgerð knýtast at anlegginum.

Men her fingu tey ein truppul-



*Soleiðis bar eisini til at koma um eina á á einum tunnuflaka*

leika, sum tey ikki høvdu roknað við. Stjórin á hotellinum var ræddur fyri, at hetta fór at taka vatn frá hotellinum. Hann forðaði fyri, at arbeiðið hjá hospitalinum kundi verða gjørt við at reka arbeiðsmenninar burtur.

Fólk frá sjúkrahúsinum royndu at tosa hann til rættis. Víst varð honum útrokningar, sum vístu, at tað var nóg mikið av vatni til allar partar. Men hetta var sum at sletta vatn á gás. Hann var hvørki til at høgga ella stinga í.

Trupulleikin var eisini tann, at ein verkfrøðingur úr Noregi skuldi koma og gera seinasta arbeiðið við vatnverkið ein ávísan dag. Tað vóru eisini norðmenn, sum høvdu stuðlað verkætlanini.

Her mátti nakað gerast, og hetta gjørdist ein "seretiopisk" loysn. Sigmund Lende uppsøkti tískil floksleiðaran í økinum, sum hann kendi væl. Hesin hevði ofta vitjað á sjúkrahúsinum. Hann greiddi frá støðuni og gjørdi kanska eitt sindur ov nógv av. Hann segði, at hetta var við at gerast eitt alment mál í Noregi orsakað av norska stuðlinum.

Floksleiðarin smíltist fyri seg sjálvan. Hann skilti væl trupulleikan, og hetta skuldi hann greiða heilt skjótt.

Morgunin eftir kom ein politibilur eftir hotellstjóranum, og hann varð settur í geglið. Hetta fingu tey boð um á sjúkrahúsinum, og arbeiðið við vatninum kundi halda á. Norski verkfrøðingurin kom og gjørdi alt liðugt til tíðina.

Dagin eftir, at hann var farin avstað aftur, varð stjórin á hotellinum sleptur leysur. Hann fekk ongantíð høvi til at klaga um tørvin á vatni.

Hospitalið sendi síðan eina tøkk til floksleiðaran!

**Komandi partur**
Nú fer at nærkast endanum á tí ræðustýrinum hjá Mengistu Haile Mariam. Hetta kemur Elsa eisini at merkja.

Sosialurin